

Polar Marquis hjá Dolphin.

# Seismikkfelagið Dolphin er sent í skiftirættin

**Jógvan Hugo Gardar**

14.12.2015 - 12:10

Oljan.fo

Sum Oljan.fo skrivaði í farnu viku, so hevur seismikkfelagið Dolphin, ið er skrásett á Oslo Børs, í longri tíð roynt at finna eina loysn á fíggjarligu trupulleikunum hjá fyritøkuni. Trupulleikar sum bara eru versnaðir so hvørt oljuprísurin er lækkaður.

Í morgun komu boðini frá leiðsluni. Tey hava ikki funnið nakrar loysnir, og tí eru tey farin í skiftirættin við Dolphin.

Góð 100 starvsfólk eru beinleiðis rakt av húsaganginum í teimum báðum feløgunum sum eru umfataði, Dolphin Group og Dolphin Geophysical, sigur fíggjarstjórinhjá Dolphin Erik Hokholt sambært E24.

Eitt av feløgunum sum verður rakt av húsaganginum er Bergen-reiðaríið GC Rieber Shipping, ið hevur leigað út trý av sínum skipum til Dolphin. langtíðaravtalan sum nú steðgar merkir ein inntøkumiss fyri Rieber uppá einar 170 milliónir krónur. Hjá Rieber vita tey ikki um allur hesin peningurin er burtur, ella um møguligt er at fáa nakað av tí aftur í skiftirættinum.